ÚTLENDINGASTOVAN

## Skrivstovustarv á Útlendingastovuni

Søkt verður eftir 1 skrivstovufólki til Útlendingastovuna at byrja 1. oktober 2008 ella skjótast til ber. Starvið er fulltíðarstarv.

**Um starvið :**
Høvuðsuppgávurnar verða at :
- hava ábyrgd av og føra journalina
- hava dagligu fíggjarumsitingina á stovninum
- hava um hendi alt vanligt skrivstovuarbeiði

**Førleiki**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving ella royndir.

Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, vera ábyrgdarfullur og røkin, kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava áhuga í at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarin skal hava góðan málkunnleika í føroyskum, duga enskt og hava góðan telduførleika.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal sendast til:

*Útlendingastovuna*
*c/o Løgmálaráðið*
*Boks 159*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu vera Útlendingastovuni í hendi í seinasta lagi 15. september 2008

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gurið Joensen, stjóra, á tlf. 220235

**Um Útlendingastovuna**
Útlendingastovan er nýskipaður stovnur undir Løgmálaráðnum. Stovnurin gevur ummæli til danska Udlændingeservice uppá umsóknir um familjusamanføring, arbeiðs – uppihaldsloyvi frá útlendingum, sum ynskja at koma til Føroyar. Stovnurin fer eisini at veita útlendingum í Føroyum kunning um rættindi og skyldur í sambandi við uppihald teirra í Føroyum. Á stovninum koma í fyrstu syftu at starvast 4 fólk : stjórin, 1 fulltrúi, 1 málsviðgerði og 1 skrivstovufólk.

Runavíkar Kommuna

## Vaskifólk til Runavíkar skúla

Søkt verður eftir vaskifólki, til skúlan í Runavík at byrja 8. sept. 2008, ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er 4 tímar um dagin.

Skrivlig umsókn skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 4/9-2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skúlavørðin á tlf. 213436

**Runavíkar Kommuna**
Postboks 139 · Heiðavegur 26 · FO-610 Saltangará

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## DAGRØKTARI
### til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktara, at byrja tann 01.oktobur 2008.

**Vit ynskja, at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 11 dagrøktarar, ein námsfrøðingur í spælistovuni og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 44.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarar ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 – 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 ella á 743251 og tosa við dagrøktarleiðaran.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17.sept. 2008 kl. 12.00.

Vinarliga send umsókn tygara til.

LEIRVÍKAR KOMMUNA

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**FO-520 Leirvík**

Sosialurin -har tað hendir



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

VESTMANNA KOMMUNA

## KUNNGERÐ
### um broytingar í bygdarskipanini og byggisamtyktini fyri Vestmanna Kommunu

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1992, um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum boðað frá, at Vestmanna Bygdarráð á fundi 26. august 2008 hevur samtykt at gera broytingar í bygdarskipanini og byggisamtyktini fyri Vestmanna.

**Størri broytingar í bygdarskipanini**
- striking av havnarøki á Grønanesi
- víðkan av havnarøki á Heyganesi og við nýggja havnarlagið
- alment frítíðarøki Úti á Toft
- alment frítíðarøki í Flatabø
- striking av øki til almennar stovnar í Vestri og tilsvarandi víðkan av sethúsaøki
- víðkan av vinnuøki við Hornaveg
- alment frítíðarøki rundan um hylin innanfyri nýggja havnarlagið
- broytingar og tillagingar av miðstaðar- og havnarøki Undir Holmabakka
- víðkan av frílendinum omanfyri skúlan í Frammbø
- broyting av ætlaðum vegi og sethúsaøkjum omanfyri Rógvu
- burturtøka av ætlaðum gongugøtum í Garðastovubønum og ímillum Gerðisveg og Rógvuveg
- nýtt parkeringsøki í Garðastovubønum
- broyting av sethúsaøkjum og víðkan av frílendum á Fitjum
- broyting av ætlaðum vegi til sethúsaøki ímillum Leitisveg og Ovara Veg
- víðkan av sethúsaøki við Leitisveg
- nýggj økir til frítíðar- og summarhús, húsvognar og tjalding uttanfyri Fossá ímillum Ovara Veg og Niðara Veg og á økinum niðanfyri landsvegin Inni á Fjørð

Harafturat eru smærri tillagingar gjørdar í bygdarskipanini og tillaging og dagføring av byggisamtyktini.

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni

**í vanligari skrivstovutíð**
**frá 3. til 24. september 2008**
**– báðir dagar íroknaðir.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 3. desember 2008.

**VESTMANNA KOMMUNA**
Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

## Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. desember til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322